# Asfalt – the good, the b



*Kritiligi bólkurin Proclaim fór á pall í Margarinfabrikkini*
*mynd: Jens Kr. Vang*

**Tað er mánadagur, og vikuskiftið og ársins Asfalt, er av. Heilt hampuligt av fólki var komið saman í Vágsbotni at lurta eftir teimum umleið 50 bólkunum, ið sloppu uppí part hesu ferð. Eg ummældi fyri Planet.fo og her eru mínir tankar um og aftaná festivalin**

*Arni Zachariassen*
*arnizach@kallnet.fo*

Tað góða

Eg vil byrja við byrjanini og siga, at eg upplivdi festivalin og kanska serliga fólkini handan festivalin sum sera professionell og góð og løtt at hava við at gera. Kanska var tað tí, eg kendi tey áðrenn, men eg helt, tað vera bæði gott og deiligt, at festivalfyriskipararnir vóru fyrikomandi og hjálpsamir, og eg haldi, at hetta sást aftur í øllum festivalinum. Fyriskipararnir megnaðu at finna ta (nærum) fullkomnu balansuna ímillum professionalismu á høgum støði og gott, gamalt gestablídni. Tjóðpallurin varð nokkso nógv forsinkaður leygardagin og, so vítt eg dugdi at síggja, var hetta júst tí, at festivalsins egni pallmeistari (tann, sum syrgir fyri at alt er uppá pláss og koyrir sum tað skal) ikki hevði júst hendan pallin um hendi. So, tumlar upp frá mær fyri framúr góða festival fyriskipan.

Karmarnar helt eg eisini vera góðar. Serliga Tjóðpallurin skaraði framúr, men allir pallarnir vóru góðir. Teir lógu tætt við hvønn annan, so tað bleiv tí ongantíð til nakað rennarí. Vágsbotnur er eisini stak hugnaligur. Har eru góð parkeringsviðurskifti og stutt er til bæði kafé, (grill)barr og samkomuhús. Asfalt hevur funnið fullkomna staðið til endamálið.

Eg helt eisini, og havi eg hildið síðan Asfalt fyrstu ferð var í fjør, at grafiski parturin av festivalinum var á sera høgum støðið. Tað bláa og rundingurin, heimasíða og bannarar – alt var sera gjøgnumført og riggaði sera væl. Hesum víðvíkjandi liggur Asfalt framman fyri allar hinar føroysku festivalarnar.

Síðan til Asfalt-hugtakið, ella konseptið, sjálvt. Hugtakið, hugsjónin og hugskotið handan Asfalt er at veita ein pall bert til føroyskan tónleik. Fylgjandi hesi stevnuskrá vera (so vítt eg veit) allir áhugaðir føroyskir bólkar, sum søkja um at spæla, góðtiknir. Hetta hevur sínar vansur, sum eg sigi okkurt um seinni, men grundleggjandi haldi eg hetta vera gott. Asfalt virkar sum ein sýnisgluggi, ið vísir hvat gongur fyri seg í føroyskum venjingarhølum júst nú. Asfalt hevur sostatt tikið leiklutin, Prix Føroyar hevði, eitt sindur yvir. Hóast einki kappingarelement er í Asfalt, so tykist tað sum pallarnir í Vágsborni hava stóran áhuga, bæði millum tey meira etableraðu, men serliga ímillum tey nýggju. Fyri okkum, ið eru áhugaði í føroyskum tónleiki, er Asfalt, meira enn nakar annar føroyskur festivalur, staðið, har man fer at takað pulsin av føroyska tónleikapallinum. Og tá ið alt kemur til alt, so er føroyski tónleikapallurin sera spennandi og tí er Asfalt eisini spennandi. Hóast nógv skræpa var at vassa ígjøgnum, so vóru fleiri orduliga góðir bólkar, harav summir vóru heilt nýggir. Asfalt er tann føroyski festivalurin, ið er best egnaður til júst hetta at hýsa nýggjum spennandi bólkum, og skuldi tað ikki undrað meg um Asfalt líkasum bleiv barometri fyri hvørjir føroyskir bólkar sleppa at spæla á teimum størru festivalunum seinni í summar.

## The minni góða

Stórsti trupulleikin hjá Asfalt í ár var mangulin uppá verulig høvuðsnøvn. Ja, Boys in a Band og Side Effect spældu fríggjakvøldið og The Dreams og Sic spældu leygarkvøldið, og vóru teir allir, so at siga, høvuðsnøvn. Men tað var einki navn, ið veruliga skapti spenning millum fólk og, fylgjandi, fekk tey at keypa billettir. Tað var eitt sindur snópisligt at síggja relativt spjaddu mannamúgvurnar, ið við næstan neyð og deyð funnu saman, tá ið bólkarnir omanfyri spældu. Kanska eru føroyingar heilt einfalt ikki nóg áhugaðir í føroyskum tónleiki til at møta fjølment upp til eitt bara-føroyskt tiltak. Ein annar faktorur, ið kanska ger seg galdandi, er peningapolitikkurin hjá Asfalt. Eingin bólkur fekk nakað fyri at spæla, men heldur hevði Føroya Banki lovað seg at koyra pening, 3000 krónur fyri hvønn bólk, í ein grunn, sum skal forbetra um tónleikaumstøðurnar í Havn. Meira um hendan politikkin seinni. Kann tað hugsast, at nøvnini, ið draga fólk – Eivør, Teitur, til ein mun, Týr, kanska fløguaktuelli Eyðun Nolsøe, heilt einfalt ikki høvdu áhuga at spæla frítt, og at hetta so gjørdi sítt til at færri fólk møttu upp? Hvussu vendir og víkir, so haldi eg øll vóru samd í, at eitt ella tvey greið høvuðsnøvn mangladu á Asfalt í ár. (Ein tanki, ið eg ikki tími so væl at hugsa, er at kanska rúsfríi politikkurin hjá Asfalt eisini gjørdi sítt til, at minni fólk legði leiðina framvið.)

Ein annar trupulleiki, ið eg legði merki til, var manglandi eftirlit. Vaktir stóðu við inngongdirnar og gingu runt á økinum og,